## Fríkendur eftir 27 ár

Charles Chatman varð í gjár latin leysur, eftir at hann av órøttum hevði sitið handan rimar í 27 ár. Í 1981 var hann nevniliga dømdur 99 ára fongsulsrevsing fyri at hava neyðtikið ein kvinnu. Charles Chatman noktaði seg tó allatíðina sekan, og nú hevur ein DNA-kanning staðfest, at tað ikki var tann nú 47 ára gamli Chatman, sum neyðtók kvinnuna. 27 ár eftir, at hann av órøttum kom inn at sita í Texas, er hann nú ein fríur maður aftur.




## Atlantic Petroleum bara hækkar

Atlantic Petroleum og Føroya Banki endaðu í hvør sínum enda á íslendska virðisbrævamarknaðinum í gjár. Tvey føroysk feløg vóru í hvør sínum enda á uppgerðini hjá virðisbrævamarknaðinum í Reykjavík í gjár. Í tí hugaligara endanum var Atalantic Petroleum, sum átti ta størstu hækkingina. Partabrøvini í felagnum hækkaðu 3,35 %. Í hinum endanum var Føroya Banki, sum fekk tað størsta fallið. Partabrøvini í bankanum minkaðu 6,56 % í virði. Í dag er øvugt. Fyrrapartin hækkaðu partabrøvini í Føroya Banka 1,75 %, og tað var tann størsta hækkingin fyrrapartin. Eik Banki er eisini kvinkaður uppaftir fyrrapartin, skrivar blaðið Vísir.

# Hent gáva til tey eldru

**Búfólkini á eldrasambýlinum í Vestmanna fingu eina óføra jólagávu í desember mánaði: Ein stóran buss, sum fer at lætta munandi um dagliga flutningin. Gevari er ein sclerosu-raktur vestmenningur í Esbjerg**

TEY ELDRU
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vestmanna:** - Bussurin hevur verið til stóra hjálp fyri Paula. Og nú vóna vit, at hann verður tað sama fyri búfólkini á sambýlinum, sigur Vanda Rasmussen, sum er mamma Paula.

Vanda og maðurin Hans Jacob fluttu úr Vestmanna til Esbjerg í 1990. Sama árið fekk sonurin Pauli staðfest sclerosu.

Hann býr nú á einum heimi fyri fólk við likamligum breki, og hevur fyri stuttum fingið annan buss at koyra seg, hagar hann vildi.

Tann gamli bussurin, sum hevði 11 ár á baki og sum einans hevur koyrt 81.000 kilometrar, var í góðum standi. Hann er haraftrat útgjørdur soleiðis at hann kann rúma trimum koyristólum.

Avgjørt varð at lata henda bussin sum gávu til eldrasambýlið í heimbygdini Vestmanna.

Áðrenn tað var bussurin til eftirlit og fekk framdar allar tær neyðugu umvælingarnar. Síðani var hann fluttur til Føroyar og handaður sambýlinum nakað undan jólum.

Her stendur hann enn við donskum nummarplátum, men so skjótt sum tær føroysku koma á, kann hann fara undir tað sum hann er ætlaður til: At lætta um hjá búfólkunum og lættliga kunna ferðast við teimum kring landið.

Á eldrasambýlinum í Vestmanna búgva sjey fólk.



*36 ára gamli Pauli Rasmussen er ættaður úr Vestmanna og fekk í 1990 staðfest sclerosu. Hann býr nú á einum heimi í Esbjerg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Bussurin er væl útgjørdur til flutning av eldri og gonguveikum fólki. Til vinstru á myndini síggjast systur Paula, Helin og Heri, systkinabarnið Linda Christoffersen, borgarstjórin í Vestmanna Karl A. Olsen eins og umboð fyri flutningsskipanina og sambýlið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




# Træ koppaði á bil

**Nakað fyri náttúrðatíð hóskvøldið koppaði eitt træ á parkeraðan persónbil í Grím Kambansgøtu í Havn, tá ein vøruvognur tók í træið**

FERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var stutt fyri nátturðatíð hóskvøldið, at ein vøruvognur kom koyrandi omaneftir Grím Kambansgøtu í Havn. Vøruvognurin var ov høgur og tók í eitt træ, sum síðani koppaði oman yvir ein parkeraðan persónbil. Neyðugt var at fáa sløkkiliðið á staðið, soleiðis at træið kundi fáast av aftur bilinum.

Sambært sjónvarpinum hjá Kringvarpinum, stóðst eingin fólkaskaða av óhappinum.



*Eingin fólkaskaði var, tá ein vøruvognur koppaði eitt træ omanyvir ein persónbil*

*Mynd: Jens Kristian Vang*